## Fyrstu svarini farin

Íslendska stjórnin hevur nú svarað nøkrum av spurningunum, sum hon fekk frá ES-nevndini herfyri í sambandi við umswóknina um limaskap. Tað sigur Össur Skarphéðinsson, uttanríkisráðharri, við Morgunblaðið. Sambært samtyktini í Altinginum skal stjórnin manna eina samráðingarnevnd og nakrar serligar arbeiðsbólkar. Tað er ikki gjørt enn, men verður gjørt fyrsta dagin, sigur ráðharrin. ES-kommiserurin Olli Rehn segði herfyri, at íslendska umsóknin kann viðgerast skjótt, men tað er treytað av, at íslendingar skunda sær at svara spurnignunum.



## Danir loyva gassleiðing

Í fleiri mánaðir hevur Russland lagt trýst á Danmark fyri at fáa danir at loyva russiska gassfelagnum Gazprom at leggja eina rørleiðing eftir havbotninum í danska partinum av Eystrasalti. Nú hevur Danmark slakað, og russar fáa tað neyðuga loyvið í dag, skrivar Politiken. Ígjøgnum ta nýggju leiðingina skulu russar senda gass úr russiska býnum Vyborg til Greifswald á týsku norðurstrondini. Fleiri lond eru ímóti leiðingini. Tey vísa á, at við henni kunnu russar steðga gassinum til Mið- og Eysturevropa, men framvegis senda gass til Vesturevropa.

Lagt til rættis:
*Rógvi Nybo,*
*Eirikur í Jákupsstovu*
*og Jón Tórur Einarsson*

# Løgtingið fyri flei

**Meginparturin av Føroya Løgtingi vil í dag hava fleiri valdømi, tá valt skal verða á ting. Tað staðfestir spurnarkanning millum tingfólkini**

VALDØMI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Beint nú vil fleirtalið á Føroya Løgtingi venda aftur til eina skipan við fleiri valdømum.

Hetta vísir spurnarkanning millum Løgtingslimirnar, sum Sosialurin hevur gjørt.

Kanningin vísir, at skuldi verið trýst á knøttirnar í tinginum, um eitt uppskot at skipa Føroyar aftur í fleiri valdømi, so høvdu 17 trýst á ja-knøttin, meðan 15 høvdu trýst á nei-knøttin.

Sjálvur spurningurin, sum Sosialurin setti teimum 33 tingfólkunum er soljóðandi:

»Um eitt uppskot varð lagt fyri Føroya Løgting um at skipa Føroyar aftur í fleiri valdømi, høvdu tygum atkvøtt ja, nei – ella blankt.«

32 vildu svara, men seinasta tingfólkið vil ikki svara tílíkum ja ella nei spurningum, og tí ber ikki til at siga, hvat Kári á Rógvi heldur um valdømir.

### Fyri og ímóti

Tá Sosialurin gjørdi kanningar vóru trý ymisk argument drigin fram, hví tað skal broytast aftur ella hví tað skal vera verandi. Tó segði onki tingfólk, at tað var fyri at sleppa á ting aftur sjálvt.

**1.** Hetta er tað mest idiotiska, eg nakrantíð havi tikið undir við. Ætlanin var at sleppa undan lokalpolitikki og hava landspolitikk, men tað hevur ongantíð verið so nógv lokalidiotisma, sum síðan vit broyttu skipanina. Og tí havi eg broytt støðu.

**2.** Skipanin er so mikið nýggj, og tí ber ógjørligt til at siga, um politiska støðan í dag, veruliga vísir, at skipanin hevur dumpað. Vit mugu síggja, hvat fer at henda og geva skipanini tíð.

**3.** Tað er upplagt at hava Føroyar sum eitt valdømi. Tað tekur minni enn ein tíma at ferðast ímillum 85 prosent av landinum, og tí skal tað sjálvandi vera eitt valdømi.

Hetta vóru argumentini, sum ávís tingfólk komu við, til sínar hugsanir um valdømi.

### Streymoy vil eitt

Verður hugt at bústøðunum hjá ymisku tingfólkunum, so eru greiðir tendensir at síggja. Tingfólk á Streymoynni – og serliga í Tórshavn – vilja helst, at Føroyar eru eitt valdømi. Men eisini í Havn eru tingfólk, sum helst vilja, at farið verður aftur til eitt valdømi. Tað eru teir báðir Bjarni Djurholm og Óli Breckmann.

Hóast teir báðir fyrr hava verið fyri at hava Føroyar sum eitt valdømi. Bjarni Djurholm legði uppskot fram um eitt valdømi longu í 90unum, meðan Óli Breckmann tók undir við at broyta skipanina í 2007.

Ein annar, sum hevur broytt hugsan – síðan tað var trýst á knøttarnar – er Heðin Zachariasen, sum býr í Norðstreymi, og nú heldur, at tað aftur skulu vera fleiri valdømi. Men hinir báðir, sum eru búsitandi í Norðstreymi vilja halda fast við eitt valdømi.

Hinumegin hava vit øll hini gomlu valdømini, har meirilutin av tingfólkunum, sum búgva har, allastaðni vilja hava fleiri valdømi.

Tó er meirilutin sera tepur í Eysturoy.

### Kvinnur vilja eitt

Hyggja vit at kynunum, so kunnu vit staðfesta, at kvinnurnar eru best nøgdar við eitt valdømi. Fýra av fimm kvinnum meta nevniliga, at haldast skal fast við eitt valdømi.

Hetta kundi verið greitt frá, við at sjey kvinnur vórðu valdar á ting, tá val var í einum valdømi, meðan til valið í 2004 vórðu tríggjar kvinnur valdar inn á ting.

Í hesum sambandi, kann eisini nevnast, at allar kvinnurnar á tingi – tá atkvøtt var fyri at gera Føroyar til eitt valdømi – tóku undir við hesum.



*25. oktobur 2007 atkvøddi Føroya Løgting fyri, at Føroyar skuldu vera eitt valdømi, tá val til Løgtingið skuldi vera næstu ferð. Nú er rákið hinvegin. Ein lítil meiriluti er í tinginum beint nú fyri at gera Føroyar aftur til fleiri valdømi*

### Fólkaflokkurin vil fleiri

Í Fólkaflokkinum er stórur meiriluti at fara aftur til fleiri valdømi. Seks av sjey tingmonnum høvdu nevniliga sagt ja, um tað bar til at velja, at Føroyar aftur skuldu í fleiri valdømir. Og støðan er næstan tann sama í Javnaðarflokkinum, har fýra av seks tingfólkum – í løtuni – høvdu tikið undir við fleiri valdømum.

Í Tjóðveldi er støðan nærum tann øvugta. Fimm av átta tingfólkum vilja nevniliga hava eitt valdømi.

Í seinasta stóra flokkinum er nærum púra javnt. Tí tríggir sambandsmenn vilja hava eitt valdømi, meðan fýra vilja hava fleiri.

### Teir minnu vilja eitt

Hyggja vit at minnu flokkunum, so kunnu vit staðfesta, at ein meiriluti í Miðflokkinum vil kunna verða valdur um alt landið, samstundis, sum tann í Sjálvstýrisflokkinum – sum vil svara – eisini vil, at øll í landinum kunnu velja seg.

### Lítil meiriluti

Men staðfestingin um meirilutan má takast við einum fyrivarni, tí í løtuni situr Mikkjal Sørensen á tingi fyri Andreas Petersen fyri Javnaðarflokkin, og tá hendan vikan er av, kemur gøtumaðurin aftur á ting.

Sosialurin hevur spurt Andreas Petersen, hvat hann heldur, men hann sigur seg ikki vita, hvat hann hevði trýst á. Men hann var upprunaliga fyri at gera Føroyar til eitt valdømi.

Skuldi hann tó havt skift hugsan, so er hann ikki tann einasti.

Kári á Rógvi má eisini nevnast, tí hóast hann ikki vil svara, so bendir á, at Sjálvstýrisflokkurin er samdur um at vilja hava eitt valdømi. Men hetta kann ikki sigast við vissu, tí Kári á Rógvi »boykottar ja ella nei spurningum«